## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eitt skifti regn. Um kvøldið sami vindur av útsynningi og sólglottar, men okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av suðri ella av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Ongantíð liðugur at fotografera Føroyar«

**Skjótt 75 ára gamli havnarmaðurin, Jákup Andreas Arge man vera serliga kendur fyri árligu myndakalendarar sínar. Hann er annars útlærdur innan Ur&Optik.**



*Jákup Andreas Arge hevur í samfull 27 ár útgivið Føroya Myndakalendara. – Eg verði ongatíð liðugur at fotografera í Føroyum*

*Mynd: Álvur Haraldsena*

DAGSINS FØROYINGUR
*Snorri Brend*

**Hevur tú altíð tikið myndir?**

- Ja, tað kanst tú siga. Eg byrjaði beint fyri 2. heimsbardaga, tá eg fann eitt myndatól. Eg keypti mær tá mín fyrsta film og tók nógvar myndir. Hetta datt tó niðurfyri undir krígnum, tá vit fluttu til Húsavíkar, men síðani 1950 havi eg fotograferað regluliga. Eg verði ongatíð liðugur við at fotografera Føroyar. Annars so gjørdi eg eisini tann væl umtókta filmin um torvskurð í Húsavík.

**Hvussu kom tað í lag?**

- Eg var við, tá teir løgdu grundarsteinin til nýggja sjúkrahúsið í Havn. Har var ein annar maður, sum arbeiddi á sjúkrahúsinum, Knud Goll og hann filmaði eisini. Vit avgjørdu at taka upp ein film um torvskurð í Húsavík, har umhvørvið var til slíkt. Vit søktu um stuðul bæði í Danmark og Føroyum, men fingu ongan. Men hugskotið var so mikið gott, at vit gjørdu tað sjálvir!

**Hevur tú verið uttanlands í summar?**

- Nei, ikki í ár. Í fjør vóru eg og konan ein túr í Danmark í samband við føðingardag hennara. Annars dámar mær væl at ferðast í Føroyum. Eg kann faktiskt ikki taka myndir aðrastaðni enn her!

**Hvørjar bøkur lesur tú?**

- Mær dámar best at lesa ferðafrásagnir.

**Hvørjum vilt tú heilsa?**

- Eg vil fegin heilsa familju, vinum og kenningum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 35 |
| Malta | 35 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 17 |
| New York | 31 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 9 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. í útsynning úr Føroyum stendur mestsum í stað og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 993 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer eystureftir og grynnist. Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarkvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/8 kl. 06⁰⁰– 23/8. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í august: 0,2° - Mesti hiti máldur í august: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,8 mm – mált frá 22/8 kl. 06⁰⁰– 23/8 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 35,5 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin




## VESTFALLSKYRRINDI

26. august — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. Aug | 07.59 | 20.20 | 06.59 | 19.20 | 07.14 | 19.35 | 09.59 | 22.20 | 10.59 | 23.20 | 06.14 | 18.35 | 05.14 | 17.35 | 08.14 | 20.35 | 09.14 | 21.35 | 07.44 | 20.05 | 08.59 | 21.20 |
| 25. Aug | 08.40 | 21.00 | 07.40 | 20.00 | 07.55 | 20.15 | 10.40 | 23.00 | 11.40 | - | 06.55 | 19.15 | 05.55 | 18.15 | 08.55 | 21.15 | 09.55 | 22.15 | 08.25 | 20.45 | 09.40 | 22.00 |
| 26. Aug | 09.18 | 21.36 | 08.18 | 20.36 | 08.33 | 20.51 | 11.18 | 23.36 | 00.00 | 12.18 | 07.33 | 19.51 | 06.33 | 18.51 | 09.33 | 21.51 | 10.33 | 22.51 | 09.03 | 21.21 | 10.18 | 22.36 |
| 27. Aug | 09.52 | 22.09 | 08.52 | 21.09 | 09.07 | 21.24 | 11.52 | - | 00.36 | 12.52 | 08.07 | 20.24 | 07.07 | 19.24 | 10.07 | 22.24 | 11.07 | 23.24 | 09.37 | 21.54 | 10.52 | 23.09 |
| 28. Aug | 10.26 | 22.44 | 09.26 | 21.44 | 09.41 | 21.59 | 00.09 | 12.26 | 01.09 | 13.26 | 08.41 | 20.59 | 07.41 | 19.59 | 10.41 | 22.59 | 11.41 | 23.59 | 10.11 | 22.29 | 11.26 | 23.44 |

5 707265 100050 >